# "Eg havi væl loyvi at liva". Náttúrufatanir og vistkritikkur í føroyskum og norðurlendskum barna- og ungdómsbókmentum

fróðskapur
Faroe University Press
Fróðskaparrit 71 (2025), nr. 2: 14-42
Náttúra og náttúrufatanir í Føroyum
©The Author(s) 2025 Open Access under Creative Commons by Attribution License. Use, distribution and reproduction are unrestricted. Authors and original publication must be credited.
www.frodskapur.fo/

# "Eg havi væl loyvi at liva". Perceptions of Nature and Ecocriticism in Faroese and Nordic Children's and Young Adult Literature

**Paula Gaard[1], Sanna Andrassdóttir Dahl[2]**

**Abstract**

The article discusses the conception of nature in Faroese and Nordic children's and young adult literature. Considering the claim that ecocritical literature has taken its permanent place in the literary landscape, reflecting a new identity, that permeates what children and young people read, the article examines how environmental problems, climate change, environmental activism, and the relationship between nature and culture are addressed in a selection of Faroese and Nordic children's and young adult literature.

**Úrtak**

Greinin viðger náttúrufatanir í føroyskum og norðurlendskum barna- og ungdómsbókmentum. Við støði í uppáhaldinum, at vistkritiskar bókmentir hava fingið fast pláss í bókmentaliga landslagnum og endurspegla ein nýggjan samleika, ið gjøgnumseyrar tað, sum børn og ung lesa, verður kannað, hvussu umhvørvistrupulleikar, veðurlagsbroytingar, umhvørvisaktivisma og sambandið millum náttúru og mentan verða viðgjørd í einum úrvali av føroyskum og norðurlendskum barna- og ungdómsbókmentum.

**Keywords**: Perceptions of nature, ecocriticism, climate changes, nature conservation, children's literature, YA-literature, environmental activism, ecocitizenship.

[1] Fróðskaparsetur Føroya, Føroyamálsdeildin, paulag@setur.fo
[2] Bókadeild Føroya Lærarafelags, sanna@bfl.fo

**Leitorð**: Náttúrufatanir, vistkritikkur, veðurlagsbroytingar, náttúruvernd, barnabókmentir, ungdómsbókmentir, umhvørvisaktivisma, vistmedborgaraskapur.

## Inngangur

Veðurlagsbroytingar og náttúruvernd hava síðan aldamótið bæði beinleiðis og óbeinleiðis fylt nógv í norðurlendskum barna- og ungdómsbókmentum. Í bókmentatíðarritinum *Standart* í juni 2022 vísir danski ungdómsbókarithøvundurin, ummælarin og ritstjórin Eva Munk á, at veðurlagsbroytingar fara ikki at hvørva, men fáa alsamt meira fokus. Tí, skrivar hon, skal tað eisini vera pláss til veðurlagsbroytingar í bókmentum. Hon sigur, at veðurlagsstríðið verður ein samleiki, ella rættari: *Enn* ein samleiki, sum tey ungu bera við sær. Á ein hátt bera vit øll í størri og minni mun, sama hvønn aldur vit hava, henda samleikan. Tí hava veðurlagsbókmentir fingið sítt fasta og trygga pláss í bókmentaliga landslagnum (Munk, 2022, s. 95).

Tey seinastu heilt fáu árini kann hetta eisini lutvíst verða sagt um tað føroyska bókmentaliga landslagið, hóast vistkritiska rákið var lutfalsliga seint á veg í Føroyum, og tað enn ikki er umboðað við stórari mongd av bókum.

Kanningin av náttúrufatanum í føroyskum og norðurlendskum barna- og ungdómsbókum, sum verður sett fram í hesari grein, hevur støði í hugsanum um bókmentir sum lið í at menta børn til virknar vistmedborgarar:

> to socialize young people into becoming the responsible and empathetic adult of tomorrow by positioning readers as ecocitizens, dedicated both to sustainable development in the local and also to global responsibility [...] readers' understandings of ecocitizenship may be constructed as they engage with texts (Massey og Bredford, 2011, s. 109-110).

Lýsingin av barna- og ungdómbókmentum, sum verður sett fram í hesum broti, tykist hava eitt yvirskipað endamál at gera børn og ung tilvitað um vandamálið við umhvørvisbroytingunum og at gera tey virkin í starvi fyri umhvørvinum. Talan er um hugmyndafrøðiligar bókmentir ella tendensbókmentir fyri børn, ið eru veðurlags- og umhvørvispolitiskar. Søguliga sæð er hetta eitt sterkt eyðkenni hjá barnabókmentum yvirhøvur. Barnabøkur, ið hava sum endamál at ala børn upp til kristin (Christensen og Appel, 2021, s. 17) ella til ein ávísan tjóðskaparligan samleika (Christensen og Appel, 2021, s. 31), eru dømi um slík hugmyndafrøðilig rák í barnabókmentum. Lið um lið við hugmyndafrøðiligu rákini, sum hava uppalandi endamál, liggur ófrávíkiliga bókmentaliga kravið um listaliga dygd: At skaldskapur – eisini barna- og ungdómsskaldskapur – skal kunna vera sær sjálvum nóg mikið.

Kannaða tilfarið er í samsvari við hugsanir um, at politisk og uppalandi endamál ikki gera seg inn á listaligu dygdina í verkinum, men er flættað inn í

listaligu heildina. Fleiri av bókunum í úrvalinum hava verið tilnevndar til Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins, sum varð sett á stovn í 2013. Virðislønin er lýsandi dømi um ynskið í norðurlendskum høpi at vísa á dygd í barnabókmentum og at virka fyri útbreiðslu á sama stigi sum vaksnamannabókmentir.

Bygt verður á eitt úrval av føroyskum og norðurlendskum barna- og ungdómsbókmentum, ið á ymiskan hátt tematisera náttúruna. Hetta verður gjørt við vistkritiskari tekstgreining. Vistkritikkur er í stuttum granskingin av sambandinum millum bókmentir og tað fysiska umhvørvið; millum tað menniskjaliga og tað ikki-menniskjaliga (Glotfelty, 1996, s. 6-7). Vistkritikkur flytur áherðsluna frá tí innara til tað ytra soleiðis, at tað, sum fyrr var karmur um skaldsligu lýsingina, nú verður flutt frá útjaðara til miðju. Hetta speglast aftur í úrvalinum við dømi frá 1915, tá fyrsta føroyska yrkingarsavn fyri børn kom út, eins og dømum, sum vísa á eina søguliga gongd í náttúrufatan í føroyskum barnabókmentum. Høvuðsbólkurin av kannaðum tilfari er tekstir, sum eru komnir út eftir 2020. Teir eru valdir út frá teimum evnum, sum verða sett fram í greinini við tí endamáli at seta fokus á føroyskar vistbókmentir í norðurlendskum høpi. Dømi um føroyskar, svenskar, finskar, danskar, norskar og íslendskar barna- og ungdómsbókmentir eru tikin við við tí endamáli at fáa eina breidd í viðgerðina og fyri at lýsa eina norðurlendska heild. Samanberandi háttalag er nýtt við tí fyri eyga at fáa yvirlit yvir kannaða økið, og neyvlesingarháttalag, ið eisini fevnir um at lesa tekst og myndir, ið virka í samspæli við hvørt annað, verður nýtt ikki við tí endamáli at gera tømandi greiningar av hvørjum einstøkum verki, men at draga træðrir úr kannaðu verkunum, sum eru við til at lýsa rákið í føroyskum og norðurlendskum høpi.

Úrvalið er fyrst og fremst gjørt við støði í barna- og ungdómsbókmentum, sum eru útgivnar sum slíkar. Tó eru eisini nakrar yrkingar, sum kunnu sigast at liggja á markinum millum ungdómsbókmentir og vaksnamannabókmentir, tiknar við. Talan er um yrkingar úr *Bónusyrkingum* (1996/2017) eftir Andra Snær Magnason og yrkingar úr *Karmageitini* (2022) eftir Marjuna Syderbø Kjelnæs. Bæði Kjelnæs og Magnason hava skrivað barna- og ungdómsbókmentir, og hóast hesar ikki eru skilmarkaðar sum slíkar, verða tær tiknar við við støði í grundgeving í trimum liðum: fyri tað fyrsta við støði í innihaldinum, sum er vent móti brúkarasamfelagnum, har ung fólk eru tann málbólkur, sum boðskapurin kann hugsast at hava størst ávirkan á og føra til handling, fyri tað annað við støði í málinum, sum er lætt og ungdómsligt, og fyri tað triðja við støði í forminum, sum er stuttur og lættur við skemtandi dámi.

Fyrst verður við serligum denti á plantulýsingar hugt afturlítandi at, hvussu náttúran verður lýst í føroyskum barnabókmentum. Síðani verður hugt at samtíðarbarnabókum, sum á ymiskan hátt lýsa, hvussu umhvørvistrupulleikar koma til sjóndar í barnabókmentum við áherðslu á fýra evni: í fyrsta lagi undir yvirskriftini mentan og náttúra samantvinnað, í øðrum lagi undir yvirskriftini veðurlag, og í triðja lagi undir yvirskriftini ung og aktivisma. At enda verða nakrir

tekstir viðgjørdir, sum lýsa nútíðarmenniskjað, ið er fremmandagjørt yvir fyri náttúruni.

## Plantur í føroyskum barnabókmentum

Kanningin av náttúrufatanum í føroyskum barna- og ungdómsbókmentum sum lið í uppaling at gera børn og ung til virknar vistmedborgarar fevnir tí ikki bert um tað, sum beinleiðis er orðað um umhvørvistrupulleikar, veðurlags-broytingar og náttúruvernd, men eisini um tað, sum gjøgnum tíðirnar er skrivað við náttúruni sum palli; tekstir, sum nýggj rák í ymsum greinum í náttúru-vísindum, samfelagsvísindum og hugvísindum nú kasta annað ljós á.

Norski bókmentagranskarin Lykke Guanio-Uluru hevur skrivað um plantur í norðurlendskum barna- og ungdómsbókmentum. Hon vísir á samband millum plantur og vistfrøði, t.d. at fugladeyði stendst av eiturevnum í landbúnaði. Hon vísir á, at við øktari fatan av leiklutinum hjá plantum í heimsins vistskipanum er mentanarlig plantufrøði vorðin ein vaksandi liður í humanistiskari gransking. Hetta hevur ført við sær ein vaksandi áhuga í at granska plantur í mentanarhøpi við tí fyri eyga at lýsa, hvussu ymisk fakøki meta plantur. Vaksandi áhugi fyri plantum í mentanargransking hevur eisini havt við sær broyttar áskoðanir á etiska virðið á plantum. Greinin hjá Guanio-Uluru er hugsað sum bókmentaligt íkast til mentanarliga plantugransking í vesturheiminum, har hugtakið "lív" annars hevur havt djór í miðdeplinum við tí úrsliti, at djóralívið hevur verið mett sum verandi tað livandi í náttúruni (Guanio-Uluru, 2021, s. 92-94).

Henda hugsanin, at lívið í náttúruni og djóralívið eru tað sama, hevur gjørt, at tað eina mest eru djór, sum fáa lív í barnabókum. Hetta er eisini galdandi í Føroyum. Hyggja vit góð 100 ár aftur í tíð, tá føroyskar barnabókmentir tóku seg upp, vóru teir fyrstu tekstirnir í stóran mun søgur, har djórini sluppu til orðanna. Taka vit úr rúgvuni, so skrivaði Hans Andrias Djurhuus í *Barnarímum* (1915) og í *Barnabókini* I og II (1923-24) um øll hugsandi djór, um ravn, rottu, kráku, síl, áll, ross, kettu, kálv, kúgv, kalva, tosk, gás, mása, ternu, lunda, skøtu, rognkelsi og lamb.

Hóast djórini fylla sera nógv í barnaskaldskapinum hjá Hans Andriasi, eins og tey sambært Uluru gera í øðrum barnabókmentum (Guanio-Ulluro, 2021, s. 94), so eru planturnar eisini til staðar í skaldskaparheimi hansara. Sera lítið var skrivað til børn, áðrenn *Barnarímur* eftir Hans Andrias Djurhuus komu út í 1915, so ein kanning av tí, sum kom út frá hansara hond, er tí eisini ein kanning av tí mesta, sum varð skrivað til børn hesa fyrstu tíðina. Í bók um føroyskar barnabókmentir lýsir Turið Sigurðardóttir tað eisini sum eina stórhending, tá *Barnarímurnar* komu út, og hon vísir á, at "alt letur, syngur og talar í einari framhaldandi samrøðu" (Sigurðardóttir, 2015, s. 61). Ikki bert fólk, men eisini fuglar, djór, urtir og veður og vindur, skrivar hon.

Ein planta, sum tosar, er dáin í yrkingini "Tey standa og vagga". Yrkingin sigur eina søgu um nøkur øks, sum deila ein dáa, ið er vaksin upp sum ókrút millum tey og bara er til fortreð. Dáin letur sær hetta ikki lynda og svarar aftur.

Men dáin stendur í iva,
og hann hevur ymsan lit:
"Eg havi væl loyvi at liva
her líka so væl sum tit."
(Djurhuus, 1922, s. 14)

Yrkingin er ein allegori, har evnisfláin sigur frá plantuheimi og snýr seg um korn og illgresi við boðskapi um, at illgresið hevur eins góðan rætt at liva og kornið, meðan myndfláin stendur opin fyri tulking og hevur verið tulkað ymiskt í ymiskum høpi. Yrkingin endar við boðskapinum: "Hvønn vøkstur Gud hevur fagnað / og hvør eigur lívsins rætt" (Djurhuus, 1922, s. 14).

Alexandur Kristiansen, ið Turið Sigurðardóttir lýsir sum arvinga eftir Hans Andrias Djurhuus (Sigurðardóttir 2015, s. 152), skrivar hálva øld seinni framvegis mest um djór, men eisini plantur eru partur av hansara skaldskaparheimi. Yrkingin "Allir kannubjøllumenn" úr fyrsta savni hansara *Kannubjølluvísur* (1977) spælir við heitið á yrkingasavninum – og blómuni – kannubjølluvísu. Alexandur tulkar "vísu" sum sang og ger søgu um kannubjøllumenn og -konur, ið eiga bæði synir og døtur:

Allir kannubjøllumenn
teir eiga hvør sín son og
eina lítla vinarliga kannubjøllukonu.

Tá ið lotið strýkur eymt
um fannafjøll og fløtur,
fáa teir so nógvar fittar
kannubjølludøtur.

Og teir syngja klokkan seks,
og tá sólin rísur,
tí teir duga ræði allar
kannubjølluvísur.
(Kristiansen, 1977, s. 25).

Taka vit orðingina úr yrking Hans Andriasar "Eg havi væl loyvi at liva", kann henda yrking lesast sum eitt aftursvar, har Alexandur ikki bert letur ókrútið liva, men gevur einari heilari familju menniskjaligar eginleikar og letur hana bæði fáa eina rødd og nørast. Hesar plantu-menniskja-hybridir kunnu samanberast við

norska barnabókarhøvuðspersónin Kubbe, sum Guanio-Uluri eisini lýsir, ið bæði er træ og menniskja (Guanio-Uluri, 2018, s. 128).

Plantan í yrkingini hjá Alexanduri Kristiansen hevur ikki ein orðaðan boðskap sum tann hjá Hans Andriasi, tó at boðskapurin stendur opin fyri tulking og kann lesast ymiskt av ymiskum móttakarum. Náttúran verður ikki á sama hátt nýtt til at siga frá menniskjanum. Tónin er lættur og spælandi, men hóast boðskapurin ikki er eyðsýndur, so liggur í hesum teksti ein áminning um eginvirðið á blómunum og ein møguligur fjaldur boðskapur um at lata planturnar liva og nøra seg.

Yrkingin "Kennir tú blómurnar?" í fyrsta yrkingasavni til børn eftir Sólrún Michelsen, *Loppugras* (2003)[3], sum eins og Alexandur letur bókina hava blómuheiti, spyr barnið, um tað kennir blómurnar í Føroyum. Her eru planturnar áhugaverdar vegna tey stuttligu og merkiligu heitini, sum menniskju hava sett á tey, og nógvar blómur verða reksaðar upp:

Kennir tú blómurnar sum vaksa
her í Føroyum
Sólju og summardá
blákollu og baldursbrá
díkimura, danadá'
og vøkru akkuleygu

Kennir tú grøsini
sum vaksa her í Føroyum
fjørugras og fransagras
húsagras og hjartagras
mánagras og mannagras
og mong mong onnur fleiri

Kennir tú berini
sum vaksa her í Føroyum
bláber og krákuber
brobber og rossaber
einiber og dunnuber
og summi kanst tú eta

Mangt ljóðar undarligt
sum veksur her í Føroyum
rossatunga, mýggjagras,
hostajavni, nalvagras,
apublóma, loppugras
ja, nógv er í at velja
(Michelsen, 2003, s. 23)

[3] Sólrún Michelsen gav tvær bøkur út til børn og ung áðrenn hetta. Barnabókina *Argjafrensar* (1994) og ungdómsbókina *Útiløgukattar* (1996).

Í yrkingini hjá Sólrún Michelsen fáa blómurnar ikki menniskjaligar eginleikar ella verða nýttar til at siga frá menniskjum. Her er eitt frásøgufólk, sum spyr ein innbygdan lesara, eitt tú, sum er barnið, um tað kennir blómurnar í Føroyum. Teksturin tosar beinleiðis við barnið, men ikki við einum moraliserandi boðskapi um menniskjavirði, sum yrkingin hjá Hans Andriasi ger, men við einum undirskiltum boðskapi um virðið á plantum. Sólrún víðkar ta gomlu lærandi siðvenjuna í skaldskapi fyri børn at læra tey heiti á djórum, teirra eginleikar og ljóð, sum t.d. sæst í kumulativu vísuni "Eg kendi mær ein ríkmann" og "Másin sigur pli" eftir Hans Andrias Djurhuus. Hon ramsar plantunøvn upp, sum í sjálvum sær vekja forvitni.

Yrkingin arbeiðir sostatt ímóti *plantublindi*, sum Guanio-Uluru sigur vera orsøk til, at menniskju veita plantum ov lítlan ans, og hetta kemur til sjóndar - eisini á vísindaligum stigi - við, at ov lítið hevur verið gjørt av at viðurkenna, hvussu týdningarmiklan leiklut plantur hava í vistskipanunum á jørðini (Guanio-Uluru, 2021, s. 93).

Endamálið við yrkingini er møguliga at læra barnið at kenna og virða blómurnar, tí tað, sum mann kennir og virðir, týnir mann ikki.

Yrkingarnar hjá Hans Andriasi, Alexanduri og Sólrún snúgva seg allar um plantur á ymsan hátt. Í tí fyrstu verður náttúran nýtt í myndamáli í lýsingini av menniskjum, í tí næstu eru hon pallur og skemtiligur frístaður hjá barninum, har lærdómur um, at plantur nørast, verður flættaður inn, og í tí triðju hevur náttúran eginvirði og skal virðismetast og nevnast við navni. Hvør einasta lítla urt.

## Umhvørviskreppa

Meira vit nærkast nútíðini, kritiskari blíva fleiri av tekstunum og meira tilvitaðir um sína dagsskrá. Yrkingin hjá Sólrún Michelsen frá 2003 er upplýsandi uttan at vera kritisk, men uttan fyri Føroyar var tónin vorðin nógv kritiskari longu tá. Íslendski rithøvundurin Andri Snær Magnason gav í 1996 út vistkritiska savnið *Bónusyrkingar,* sum kom út aftur í 2003 í øktari útgávu, 33 % meira, sum eisini stendur á permuni. Yrkingasavnið kritiserar nýtslumentan, sum komið verður aftur til seinni í greinini. Í 1999 skrivaði Magnason barnabókina *Søgan um bláa knøttin* (1999/2001), sum eisini kritiskt viðger sambandið millum náttúru og menniskju og serliga, hvussu ójavnt náttúruríkidømið er býtt á jørðini.

Danski bókmentagranskarin Jens Kramshøj Flinker vísir á, at vit eru komin inn í eitt nýtt tíðarskeið, har menniskjað er vorðin ein nýggj og planetbroytandi megi. Henda nýggja tíðin, menniskjans tíðarskeið, antroposen[4], bjóðar einari røð av føstum mentanarligum høvuðstropum í samfelagnum av, t.e. hugsanum, frásagnum og myndum, sum t.d. verða nýttar í barna- og ungdómsbókmentum.

[4] Hugtak, sum Cruzen og Stoermer førdu fram (Crutzen og Stoermer, 2000, s. 17-18).

Hon bjóðar tí eisini teknarum, rithøvundum, forløgum og granskarum, sum fáast við barna- og ungdómsbókmentir, av (Flinker, 2021, s. 14-15). Eins og Guanio-Uluru vísir Flinker á, at náttúruvísindi og barna- og ungdómsbókmentir hava nógv við hvørt annað at gera.

Granskarar hava víst á, at jørðin er farin frá tí jarðsøguliga millumístíðarskeiðinum, tí menniskjað hevur broytt fysiska umhvørvið viðvíkjandi alheimsupphiting, lívfrøðiligum margfeldi, avskóging og radio-aktivum tilfari og mikroplasti í høvunum. Flestu okkara hava livað í hesi tíð uttan at givið okkum far um tað, sigur Flinker, tí at avleiðingarnar av menniskjans inntrivum ikki veruliga hava víst seg fyrr enn nú. Í heitinum menniskjans tíðarskeið liggur m.a. menniskjaskapt útlát, oyðandi inntriv og náttúru-broytingar. Menniskjað ávirkar ikki bara fysiska umhvørvið og hevur ræði á tí, men tað fysiska umhvørvið ávirkar í stóran mun eisini menniskjað og stýrir tí - til dømis við ekstremum veðri og tungmetalum í tí, vit eta. Flinker vísir á, at vit ikki longur kunnu tosa um "mentan" og "náttúru" sum tvey atskild fyribrigdi (Flinker, 2021, s. 15-16):

> teoretikere opfordrer os imidlertid ikke kun til at genoverveje vores forhold til, hvad natur er. De rejser også spørgsmålet om, hvilke former for litterære fremstillinger der synes mest æstetiske og adækvate i forhold til at formidle en forståelse af naturen, der rækker ud over noget, som er harmonisk og afbalanceret til fordel for en langt mere kompleks naturforståelse (Flinker, 2021, s. 16).

Flinker vísir til vistkritikaran Greg Garrard (2004), sum skrivaði, at tann pastorala frásøgnin síðan romantikkin hevur myndað náttúrufatanina í vesturheiminum. Tað, sum yvirskipað eyðkennir bókmentir við pastoralum[5] drøgum, sigur Flinker, er, at náttúran er eitt idealiserað friðskjól í einum ruðuleikakendum moderniteti, har vit finna ein ektaðan og upprunaligan samleika. Tað pastorala er sera kritiskt mótvegis moderniteti, og loysnin er tí at venda aftur til tað fyrimodernaða samfelagið við tøttum sambandi við náttúruna.

Hinvegin vil søgan, sum setir menniskjað í miðjuna, vera við, at einki upprunaligt og ektað "uttanfyri" er til longur. Einki tílíkt stað er longur at venda aftur til, tí mentan og náttúra eru flættað saman. Áhugaverdu spurningarnir, sum greinarhøvundurin setir, eru: "Hvussu sæst tað í barna- og ungdómsbókmentum, at tann pastorala frásøgnin ikki rættiliga hóskar í menniskjans tíðarskeiði, og hvussu sær ein hybrid, kompleks og umbroytilig náttúra út í norðurlendskum barna- og ungdómsbókmentum?" (Flinker, 2021, s. 16-17). Hetta eru nakrir av spurningunum, ið liggja til grund fyri viðgerðini av teimum nýggju barna- og ungdómsbókmentum í næsta broti.

---

[5] Um pastoralu í føroyskari náttúruyrking (Marnersdóttir, 2018).

***Mentan og náttúra samanflættað***

*Mítt botnlív* (2020/2022) eftir finnlandssvenska myndprýðaran og rithøvundin Lindu Bondestam, vísir væl, hvussu kompleks og umbroytilig náttúran kann síggja út í einari nýggjari norðurlendskari barnabók. Hon hevur nógv løg og tekur mong evni upp, og hon vísir, at náttúra og mentan eru vorðnar partar av somu søk, og at tað ikki ber til skilja tær at.

Bókin byrjar við einari skapanarsøgu: "Einaferð var jørðin púrasta nýfødd" (Bondestam, 2020/2022, s. 1). Vit síggja eina mynd, ið er harmonisk. Har eru alskyns djór, eisini tey, sum nú eru útdeyð, og einans tvey menniskju, ein kona og ein maður, eru at hóma. Tey klemmast. Men longu á aðru opnu eru vit nær einum veruleika, ið líkist okkara nútíð. Alt er fult í lýsingarskeltum og sera upptiknum fólkum, ið ikki síggja út til at hava tíð at tosa saman. Antin hyggja tey í ein skíggja, ella hava tey sólbrillur fyri eyguni ella hyggja niður. Øll síggja út til at hava skund, og skundmatur fyllir nógv.

Á triðju opnu eru vit endiliga hjá høvuðs"persóninum", axolotlinum, og her síggjast eisini menniskjainntriv. Vit síggja beint á eitt stórt súgvirør í sjónum. Á fjórðu opnu møta vit aftur menniskjum og síggja beint á eitt par, ið tekur sjálvsmynd. Á arminum á manninum er heldur ironiskt tatoverað "Carpe Diem". Vit síggja eisini nógv rusk frá menniskjum, ið liggur og flýtur í sjónum. Menniskjuni verða lýst við sjónarhorninum hjá axolotlinum, og hann kallar tey klombur.

Axolotlurin ber seg at sum eitt menniskja. Hann gongur í skúla, samlar upp á ting og tránýtir iPhone. Axolotlarnir halda enntá klomburball og herma eftir dansandi menniskjunum, teir hava sæð.

Bókin viðger ikki einans samanrenning millum mentan og náttúru, men er eisini beinleiðis inni á veðurlagsbroytingum. "Ein dagin var vatnið merkiliga heitt. Uppi yvir vatnskorpuni var luftin heit," og á myndini síggja vit skógareldar (Bondestam, 2020/2022, s. 22). Síðan kemur vatnflóðin, og axolotlurin verður slongdur í land. Á einum skelti stendur: "Stongt vegna illveður" (Bondestam, 2020/2022, s. 31). Síðan er tað, sum um heimurin gongur undir og byrjar av nýggjum - men nú uttan menniskju.

Fleiri barnabókagranskarar hava viðgjørt *Mítt botnlív*, og svenski barnabókmentagranskarin Lydia Wistisen hevur kannað sambandið millum náttúru og mentan í bókini. Hon sigur, at náttúran ikki er tað, hon hevur verið í barnabókmentum, og tað er ein beinleiðis ávirkan av dálking og veðurlagskreppu. Siðvenja hevur verið, at tað hugnaliga pastorala og bygdarlívið hava staðið sterkt í barnamentanini. Barnabókin er nú ávirkað av dálking og veðurlagskreppu. Umhvørvisórógv er millum tey temu, sum fylla mest í barnabókmentum, men serliga dálking í náttúruni fyllir nógv: "Det är tydligt att barnboken befinner sig i "skräpocen, skräpets tidsålder" (Wistisen, 2021, s. 37). Vit eru v.ø.o. í "rusktíðarskeiðinum", eitt hugtak, sum Wistisen vísir á, at umhvørvissøgufrøðingurin Marco Armiero kom við í 2019, ið vísir til, at vit liva í

einum heimi, sum framleiðir eina rúgvu av tingum, sum um stutta tíð verða tveitt burtur.

Svenski barnabókmentagranskarin Mia Österlund vísir á, at í *Mínum botnlívi* eru tvær ymiskar tíðir, sum kappast: Lívsins byrjan og stigvísa menning mótvegis nýtslumentan og kapitalismu. Eisini tekur hon fram, at talan er um eina havsjálvbiografi (Österlund, 2021, s. 19).

Vit eru á havbotni og autofiktiva eg-frásøgufólkið er einsamalli axolotlurin. Á aftastu síðu í kolofonini sæst hetta við, at axolotlurin sæst sita og skriva. Undirtittulin á bókini er jú *Skrivað hevur ein einsamallur axolotlur.* Axolotlurin yvirlivir, tá menniskjað er farið. Hann fortelur okkum, at hann er nær um týndur eins og onkur av hinum djórunum, sum verða lýst á fyrstu síðu, har dinosaurar og mammutar eru at síggja.

Í *Mínum botnlívi* eru menniskja og djór flættað saman. Náttúra og mentan eru somuleiðis samanflættaðar, og vøkstur og rusk eru flættað saman. Rithøvundurin sleppur sær ikki undan, men gerst partur av hesi samanrenning. Eitt navnaskelti við navninum "Bondestam" liggur tveitt á botninum, og við hesum kemur eisini ein metaviðmerking inn, har høvundurin tekur lut í fiktio-autofiktiónini hjá axolotlinum. Í hesum sæst lætti "pennurin" í bókini, har pláss er fyri humori, hóast evnið er sera álvarsligt, og spurningur kundi verið settur við, um tað er hóskandi endi fyri smábørn, at menniskjuni hvørva og eru ikki til longur. Hetta er eisini ein spurningur, sum er nógv viðgjørdur í barnabókagransking; um tað er rætt og/ella gevur úrslit at nýta humor, tá trupul og álvarsom evni skulu lýsast í barnabókum. Komið verður aftur til hesar spurningar í viðgerðini av *Sum rótskot* (2020) og *Ein himmal fullur av skýggjum* (2018/2023), har spurningur eisini verður settur við, hvørji amboð rigga fyri at fáa menniskju at kenna ábyrgd fyri veðurlagskreppuni.

Spurningurin er, um *Mítt botnlív* endar væl ella ikki. Hon endar ikki væl fyri menniskjuni, men hon endar væl fyri axolotlin, og tað er honum, lesarin hevur samkenslu við gjøgnum bókina. Axolotlurin, ið var um at doyggja út, yvirlivir og fær eins og kannubjøllumenninir í yrkingini hjá Alexanduri Kristiansen fult av avkomi. Men hvat varð av menniskjunum, og hvat merkir tað fyri fatanina av bókini? Hvat er tað fyri náttúrufatan, sum her verður sett fram? Bókin er ein apokalypsa og kann lesast sum ein modernað Vøluspá. Bygnaðurin í henni líkist bygnaðinum í aldagomlu yrkingini, har Vølvan spáar um heimsins undirgang og eina nýggja jørð. Seytjanda opna í *Mínum botnlívi*, har alt er myrkt, og einasti tekstur er "Alt gjørdist friðarligt" (Bondestam, 2020/2022, s. 33), kann samanberast við, tá vølvan í *Vøluspá* sigur: "Sólin sortnar, / í kav foldin sígur, / hvørva av himni / heiðar stjørnur" (*Vøluspá*, 2017, s. 37). Men eins og vølvan sær fyri sær nýggja verð, vaknar axolotlurin og finnur ein annan einsamallan axolotl. Ein maka. Hansara heimur rísur av nýggjum, og tann nýggja verðin verður lýst á seinastu opnu sum ein bjartskygd nýggj byrjan, har botnlívið er vorðið eitt topplív fyri axolotlin.

Bókin byrjar og endar við sitatum fyrst frá rúmdarfaranum Mike Collins á Apollo 11 og síðani NASA-rúmdarfaranum Edward Tsang Lu úti í stjørnuhimmalinum. Umleið 30 ár eru ímillum sitatini – fyrst verður lýst, hvussu lítil og viðbrekin hasin knøtturin jørðin har niðri er, og síðan, hvussu tað hevur eydnast menniskjum at breiða seg út um alla gongustjørnuna á øllum hugsandi støðum. Hetta fær lesaran at hugsa um stóru myndina. At alt hongur saman. At tað bara er ein knøttur, og at alt, vit gera, ávirkar onkrastaðni.

Danski barnabókmentagranskarin Anna Karlskov Skyggebjerg vísir í viðgerð av bókunum *Naturen* (2022) eftir Emmu Adbåge, sum komið verður inn á í næsta broti, og *Mínum botnlívi* á, at náttúran verður sett í miðdepilin á nýggjan hátt í teimum nýggju norðurlendsku myndabókunum. Náttúran hevur sína egnu dagsskrá og sína egnu megi. Bókmentirnar seta parantes um tað menniskjaliga við at lata náttúruna klára seg sjálva og gera menniskju til eykapersónar (Skyggebjerg, 2023, s. 26).

Tvær føroyskar bøkur, sum meira óbeinleiðis lýsa, at mentan og náttúra eru samanflættaðar, eru *Ódjór* (2022) eftir Silju Aldudóttur og *Stríðið um tað góða grasið* (2012) eftir Bárð Oskarsson. *Ódjór*, sum Bárður Dal Christiansen myndprýddi, tekur menniskjaskaptar umhvørvistrupulleikar upp við at lýsa dálkaða náttúru: "Vatnið var so djúpt, at labbarnir á rottuni rukku ikki niður á botn. Skræddar aluminiumsdósir og slintrur av presending lógu tættar inn at kroppinum, sum rak við streyminum oman gjøgnum myrkrið" (Aldudóttir, 2022, s. 7). Ruskið í ánni er lýst: "Hon hugdi niður í hana, tá hon gekk framvið, og snerkti, tá hon sá renslið, har vatnið steðgaði. Brúnt vatn skúmaðist kring rimarnar á girðingini, og inni í øllum skúminum dansaði ruskið, sum bleiv slongt oman við streyminum" (Aldudóttir, 2022, s. 11). Aðrastaðni verður áin lýst sum oljudálkað: "niður í ánna, sum skygdi svørt og oljublettut" (Aldudóttir, 2022, s. 11).

*Ódjór* snýr seg um vinalag og trupulleikar í skiftinum frá at vera barn til at vera tannáringur, men hon viðger eisini samanrenningina millum náttúru og mentan. Áherðslan á dálking í náttúruni er, sum víst við dømunum, týðilig, men aðrar tilsipingar til umhvørvið eru meira óbeinleiðis til staðar, serliga í myndini av tí stóra ódjórinum – orminum undir jørðini, sum Asta má gera seg væl við fyri at fáa leysan, so hann ikki leggur býin í oyði. Ræðandi ódjórið er tó ikki so ræðandi sum væntað, og samanrenningin millum ódjórið í náttúruni og gentuna gerst týðiligt, tá Asta fyrstu ferð møtir orminum í tunlinum og finnur út av, at tað ikki bara var hon, sum var bangin fyri orminum. Hann var bangin fyri henni og hevur brúk fyri hennara hjálp fyri at sleppa leysur úr tunlinum undir jørðini (Aldudóttir, 2022, s. 82-83).

Í *Stríðnum um tað góða grasið* liggur rusk frá menniskjum í grasinum, m.a. lím og súgvirør. Náttúran verður lýst í samspælinum við djór, sum eru menniskjaliggjørd. Tey hava fingið menniskjaligar eginleikar og klandrast um, hvør skal hava ættin til tað góða grasið. Vistkritiski vinkulin er óbeinleiðis í hesari bók. Kaninir og hundar liva saman í tí góða grasinum. Tað var tað grønasta,

bleytasta og mjúkasta grasið, og tað smakkaði so væl. Men eftir at hundarnir vóru lumpaðir burtur frá grasinum, gerst tað minni grønt, hvassari og smakkar ikki so væl. Síðani kemur sannkenningin, at tað kann ikki vera gott, fyrr enn tað er pláss fyri øllum: "Kaninirnar skiltu nú á lagnum, at grasið bara var gott, tá ið hundar eisini sluppu at vera á tí" (Oskarsson, 2012, s, 26). Hetta er eitt dømi um, at eitt at síggja til einfalt inntriv í eina vistskipan fær óhepnar avleiðingar.

## *Veðurlag*

Áherðslan hjá granskarum á, at sjálvt veðurlagið er farið at broytast síðstu árini, er, sum nevnt í sambandi við viðgerðina av *Mínum botnlívi*, farið at síggjast meira og minni eksplisitt aftur í barna- og ungdómsbókmentum. Svenska myndabókin *Eta gras* (2019/2020) eftir Sami Said, sum Sven Nordqvist myndprýddi, viðger veðurlagsbroytingar, fátækradømi og kapitalismu. Á fyrstu síðu eru vit í eini lítlari bygd, og har er nógv matframleiðsla. Har eru grønir akrar og veltur og nógvar geitir og melónir. Men vit eru eisini í nútíðini, tað minnir maðurin við snildfonini okkum á. Vit verða beinanvegin mint á týdningin av reinum vatni og síggja, hvussu øll ættarlið eru við í arbeiðinum at halda framleiðsluni uppi.

Tað er nærum altíð frá einum ekstremi til hin við veðrinum: "Tá tað ikki er turkur, er tað aloftast vatnflóð. Regnið vil ikki slíta í. Tað heldur ikki so frægt sum frí í vikuskiftinum" (Said, 2019/2020, s. 14). Fólkini gerast bæði tyst og svong. Tey eru beinleiðis tongd at matframleiðsluni, sum tey liva av. Tey hugsa t.d. um maisið, og hvussu tað nú skal klára at vaksa. Maisið og menniskjuni bera seg eins at: "Tá maisplanturnar á akrinum eru tystar, fáa tær sama lit sum sandur. Sangur teirra verður til grát. Tær toyggja bløðini móti himli og titra spakuliga í takt. Júst sum vit" (Said, 2019/2020, s. 7).

Tey vaksnu eru í neyð og spyrja sólina: "Sól, sum kendi mammur okkara og teirra mammur, hví revsar tú okkum?" (Said, 2019/2020, s. 9). Og tá tað regnar av grimd, tosa tey við skýggini: "Skýggj, sum kendu pápar okkara og teirra pápar, hví lata tit okkum ikki fáa frið?" (Said, 2019/2020, s. 11). Vistskipanir, sum hava verið í javnvág, tá mammur/pápar og ommur/abbar stóðu fyri framleiðsluni, eru nú úti av lagi, og børnini siga: "vit verða eisini bangin. Eingin hevur hug at vera óvinur við eina stjørnu sum sólina. Hvat hava vit gjørt henni?" (Said, 2019/2020, s. 9). Myndirnar tala fyri seg og pensla neyðina út. Vit síggja eina aðra síðu av Sven Nordqvist, ið annars teknar bygdarhugna, sum vit kenna frá Pettson og Findusi. Í *Eta gras* sæst, hvussu bæði rithøvundur og myndprýðari hava lagað seg til tann broytta veruleikan og tikið við avbjóðingini, sum Flinker er inni á.

Kapitalismukritikkurin er eyðsýndur. Sølumaðurin er klárur, 2 fyri 1, fyrst við skýglúpum fyri at lokka regnið fram, tá turkur er, og síðan við sólmagnetum at seta á tekjurnar, tá tað er vatnflóð. Ting og tøkni skulu v.ø.o. bjarga menniskjaættini frá veðurlagsbroytingunum.

Bókin endar kortini væl. Imani er mett og trygg, og veðrið er til vildar: "Her eru vit, undir sólini og skýggjunum. Eg eigi eina fitta mammu, hønu mína Roro,

og eg eigi meg sjálva. Kann mann ynskja sær meira?" (Said, 2019/2020, s. 24). Aftur her verður hildið í hondina á barninum, og barnið kann varðveita vónina.

Svenska myndabókin eftir Emmu Adbåge *Naturen* (2020) viðger veðurlagsbroytingar. Hon ger tað meira beinleiðis og ófjalt, og tað er freistandi at kalla bókina eina dystopiska satiru til børn. Í *Naturen* er náttúran enn meira avskeplað og somuleiðis tey vaksnu. Í byrjanini á bókini eru býurin og menniskjuni útgangsstøðið. Barnið eigur sjónarhornið. Náttúran er uttanfyri: "Utanför vår by ligger lite annat. Det kallas för Naturen. Men det är mest bara skog, nån sjö, lite buskar och nåt hav" (Adbåge, 2020, s. 2). Men myndin á somu síðu sigur júst mótsett. Træið er stórt og sentrerað, vit síggja nógv grønt, hav og vøtn. Bygdin er lítil og húsini fýrakantað og bleik við útjaðaran. Náttúran harafturímóti hevur sterkar litir og rundar formar. Í ikonotekstinum hómast soleiðis spenningurin ímillum menniskjuni í býnum og náttúruna. Náttúran fær lítla rúmd í tekstinum, men hon fær nógva rúmd í myndunum.

Bókin viðger sambandið millum náttúru og menniskja, men hon er eisini um menniskjanáttúru. Tá veðrið gerst alsamt meira ekstremt, keypa tey vaksnu útgerð, ið kann verja teirra ognir. Tá tað er ov heitt, og tey ikki kunnu svimja í sjónum, útvega tey sær ein svimjihyl. Í vakstrarlagnum eru børnini proportionell, men tey vaksnu hava enormar, ófantaligar kroppar og sera smá høvd. Hetta kann hugsast at ímynda, at teirra trá er yvir teirra skilvísi. Tey vaksnu eru altíð óð inn á veðrið, líka mikið hvussu tað háttar sær: "Dumma snö" (Adbåge, 2020:12) og "JÄVLA NATUR!" (Adbåge 2020, s. 29). Tá veðurlagið fer at broytast, og hitin hækkar, geva tey vaksnu náttúruni skuldina: "Naturen bara gassar på med värme" (Adbåge, 2020, s. 25). Tá náttúran er farin at svara so ógvisliga aftur, at tað gerst óliviligt fyri menniskjuni, fara tey í bilarnar, tí har er luftkøling. Tá senda tey enn meira vakstrarhúsgass út í atmosferuna. Eftir hetta gerst veðrið enn meira ekstremt: snarljós, eldur og oysregn. Reaktiónin hjá menniskjunum er heldur komisk: "JÄVLA NATUR! ropar alla. Vi har faktiskt gjort fint här med grus och asfalt och tagetes! Vet du vad det KOSTADE?!" (Adbåge, 2020, s. 29). Her síggja vit aftur tað, sum Flinker er inni á, at tað er ikki bert menniskjað, sum ávirkar veðrið, men eisini umvent.

Bókin endar við somu orðum, sum hon byrjaði við uttan tað, at nú er náttúran í miðdepli og bygdin í útjaðara. "Och på ett ställe, liksom utanför Naturen, där ligger vår by. Men det är mest några hus och lite asfalt och sånt" (Adbåge, 2020, s. 30). Í tekstinum flytur bókin seg frá, at menniskjað er í miðjuni, til at náttúran er í miðjuni, og nú er samsvar í ikonotekstinum.

Báðar myndabøkurnar *Eta gras* og *Naturen* lýsa eksplisitt avleiðingarnar av, at veðurlagið er farið at broytast. Munur er tó á, hvussu stórar avleiðingar tað hevur á menniskjuni í suður- og norðurheiminum, tí tey í norðurheiminum hava tøkni, sum kann verja tey ímóti avleiðingunum eina løtu.

### *Ung og aktivisma*

Í hesum brotinum flyta vit okkum frá myndabókum til børn til skaldsøgur til ung. Høvuðspersónarnir í útvaldu bókunum eru allir virkisfýsnir og vilja broyta heimin. Haraftrat eru teir kritiskir mótvegis eldra ættarliðnum og makthavarunum, ofta so mikið at teir vilja fara so langt sum at fremja borgaraólýdni.

Áður nevnda *Sum rótskot* (2020) eftir Marjuna Syderbø Kjelnæs snýr seg um ung, sum vilja broyting og vilja gera okkurt við trupulleikarnar, heimurin er komin í. Perman kennist tilfarslig, greinar, grøs, bløð og blómur, alt er úr náttúruni. Klótan er sentrerað, og eitt grashjarta er á. Permuna hevur Høgni Egholm Magnussen gjørt, og hon leiðir lesaran beint inn í temað í bókini. Heitið er ein tilsiping til eitt ørindi í Bíbliuni, og tað er eins og *Loppugras*, *Kannubjølluvísur*, *Stríðið um tað góða grasið* og *Eta gras* úr plantuheiminum. Ein ábending um, at menniskja og náttúra hanga óloysiliga saman. Sitatið vísir til ein spádóm:

> Hann rann upp sum veik planta fyri ásjón Hansara, sum rótskot úr turrari jørð; Hann var ikki fagur og hevði onga dýrd; vit sóu Hann, men Hann sá ikki so út, at vit kundu hava tokka til Hansara. (Esaias 53;2)

Áður nevnda Guanio-Uluru vísir á, at í norrønu skapanarsøguni verða Askur og Embla til úr limunum á ymiskum træsløgum (Guanio-Uluru, 2021, s. 93), og her kemur bjarging heimsins upp úr jørðini sum ein planta.

Parateksturin avdúkar, hvør ætlanin við bókini er. Í eftirmælinum stendur:

> Tað ger meg til ein part av ættarliðnum, sum ikki megnaði at broyta heimin. Vit, sum bara hildu á at troyta uttan veruliga at hugsa um, at vit løgdu brenni á bálið [...] Og takk til tykkum lesarar – við vón um, at bókin ger mun. (Kjelnæs, 2020, s. 122)

Dagsskráin hjá rithøvundinum er sostatt tann sama sum tann hjá høvuðspersónunum í bókini, tey vilja broyta heimin.

Skaldsøgan er realistisk. Hon gongur fyri seg í okkara samtíð við okkara gerandisdegi og okkara trupulleikum. Vit eru í Havn, á Glasi og til veðurlagsverkføll í býnum. Bókin er ikki uppbygd í beinari tíðarrøð, og hon hevur ymisk sjónarhorn. Hon letur seg upp m.a. gjøgnum loggbók, orðaskifti og røður. Fríða er frásøgufólk, og Miriam eigur loggbókina. Fríða og Miriam eru bestu vinkonur. Fríða er framlig og frísk, meðan Miriam er meira afturhaldandi, og hon er álvarsliga sjúk. Í loggbókini skrivar hon eina røðu, sum Fríða lesur upp til eitt veðurlagsverkfall, eftir at Miriam er deyð. Vinir teirra Steffan og Pax stríðast saman við teimum at royna at broyta heimin. Partur av tí, sum drívur søgugongdina, er, at vinirnir fyrireika eina atsókn og vilja fara so langt sum at fremja borgaraólýdni fyri sína sak. Bókin kann sigast at snúgva seg serliga um umhvørvisstríð, men hon snýr seg eisini um vinalag, ungdómslív og samleika,

forelskilsi, sjúku, deyða, trúgv, vísindi, ættarliðsstríð og samspælið millum máttloysi og stríðshug.

Sambandið millum náttúru og mentan verður fleiri ferðir umrøtt og problematiserað, millum annað tá tey eru í viðarlundini og tosa um ánna. Tey tosa um skeltið, har tað stendur, at ”Vatnið í ánni er dálkað. Tí verður mælt frá at spæla í ánni” (Kjelnæs, 2020, s. 33). Men síðan verður sagt heldur skemtandi um dunnurnar, at ”sjálvandi halda tær fram við tí, dunnur duga jú ikki at lesa skelti” (Kjelnæs, 2020, s. 33).

Náttúran verður ikki romantiskt og pastoralt lýst, men tað pastorala verður óbeinleiðis viðgjørt. ”Áin rann har, ”tutlandi”, sum tað óivað stóð í onkrum gomlu sangi. So æviga pent og deiligt” (Kjelnæs, 2020, s. 32). Nútíðarmenniskjað er í náttúruni, men vit verða mint á, at tað ikki er so idylliskt, tí vatnið er dálkað.

Einaferð situr Fríða og hugleiðir: ”Náttúran er tó ikki sum menniskja-náttúran, mann kann ikki býta hana upp í gott og ilt” (Kjelnæs, 2020, s. 63), og eina aðru ferð hugsar hon:

> Eg siti undir einum stórum træi. Greinarnar vagga í vindinum. Hoyrdi tú hatta? Kanska eru tað fleiri, sum eru í parti við tær, havi eg hug at fortelja tí. Men tað veittrar bara við sínum gulu bløðum og suðar. Hevur úr at gera við at vera træ. (Kjelnæs, 2020, s. 73)

Her fara hugasambond til myndabókina *Naturen*, sum er viðgjørd omanfyri: ”Naturen tycker intet särskilt, den bara står där helt vanligt och växer och kvittrar och susar och skvättar” (Adbåge, 2020, s. 4).

Til ber at benda á samsvarið við byrjanina og endan á *Mínum botnlívi*, tá umræður størra perspektivið og út- og innsuming í tekstinum – at síggja gongu-stjørnuna heilt harútifrá og inn í smálutir:

> Alt hekk saman og treytaði hvørt annað, tað skiltu vit. Klótan var bundin at ljósinum og hitanum frá sólini, himmalløgini vardu okkum móti geislan, og mánin hálaði í sjógvin. Men niðri á jørðini komu menniskju altíð inn í myndina og broyttu javnvágina: Oyddu skógir og djórasløg, dálkaðu vatnið og luftina og løgdu eina slóð av ruski eftir seg. (Kjelnæs, 2020, s. 12)

Vit eru í rusktíðarskeiðinum, sum áður nevndi Marco Armiero hevur navngivið:

> … um nøkur millión ár, tá ið tann næsti intelligensurin kemur fram og fer at grava í jørðini, so fara tey at koma niður á eitt pinkalítið, stinkandi plastlag, sum er eitt sindur grønt av radioaktiviteti – tað er tað. Tað er tað heila, sum fer at verða eftir av okkum menniskjum. (Kjelnæs, 2020, s. 29)

### *Ung, sum vilja broyta heimin*

Ættarliðskonfliktir fylla nógv í skaldsøguni *Sum rótskot.* Foreldrini og tey ungu hava ikki somu fatanir ella vitan um umhvørvistrupulleikar, og hvat eigur at gerast. Hetta kemur fram ferð eftir ferð í samrøðunum og elvir til skeld og frustratiónir fyri bæði tey yngru og eldru. Tey eldru vilja vera við, at tað ikki er so galið statt og koma við undanførslum. Tey ungu vilja kjakast og koma beint til sakina: "Tú gert hetta bara fyri at provokera meg, Miriam! Nei, mamma, eg geri hetta bara fyri at royna at bjarga heiminum, og tú mást inniliga orsaka meg, um tað provokerar teg!" (Kjelnæs, 2020, s. 22). Tey ungu krevja handling og broyting, og hartil kemur tað religiøsa aspektið, at summi av teimum eldru kalla vitanina um veðurlagsbroytingar fyri dómadagsprofetiir: "So mugu vit leggja tað í Harrans hendur og ikki stúra, ha?" og svarið er: "Nei, babba, nú mást tú gevast við at vera so kyniskur at halda, at einki ger nakran mun, ella vera so naivur, at tú heldur, at onkur fer at fiksa tað heila fyri teg!" (Kjelnæs, 2020, s. 92).

Tað er kanska tað, sum tey ungu uppfata sum líkasælu frá teimum vaksnu, eisini teimum fólkavaldu, sum standa fyri skotum í bókini, ið førir við sær, at tey fremja borgaraólýdni. Tey taka, sum komið verður aftur til, sakina í egnar hendur.

Í norsku skaldsøguni *Ein himmal fullur av skýggjum* (2018/2023) eftir Arne Svingen koyra eins og í *Sum rótskot* tvær parallellar kreppur samstundis. Høvuðspersónurin og eg-frásøgufólkið er 11 ára gamli Henrik. Hann er deyðasjúkur, og heimurin er í veðurlagskreppu. Diagnosan, ið Henrik fær, ger, at hann alt fyri eitt setir sær fyri at bjarga heiminum. Henrik hevur sett seg væl inn í tingini og er viljasterkur. Hann hugsar um sítt kolevnisfótaspor, og hann vil hava øll hini eisini at hugsa um sítt. Hann veit, at setast skal inn á øllum frontum. Men serliga vil hann hava bygnaðarbroytingar: "Onkrastaðni má eg byrja. So hví ikki byrja ovast uppi?" (Svingen, 2018/2023, s. 24). Hann hevur eisini so mikið breitt perspektiv, at hann setir samband millum dálking og alheimsupphitingina (Svingen 2018/2023, s. 137-138). Henrik hugsar globalt, eins og Fríða ger í *Sum rótskot*: "Hinumegin jørðina sat ein fjøld av barnatrælum og framleiddi allar vørurnar, men tað legði eingin av álvara nakað í. Eingin" (Kjelnæs, 2020, s. 32).

Konfliktin millum mammuna og Henrik, altso millum vaksnahugsan og hann, kemur fram longu á aðru síðu og verður beind inn í bilismuna, sum Henrik vendir sær frá, og hann kallar bilin dieseltrøllið (Svingen, 2018/2023, s. 6). Hetta sæst eisini í *LA SKOGEN LEVE!* (2022) eftir Nora Dåsnes, har høvuðspersónurin Bao noktar at koyra við í fossilbilinum hjá mammuni (Dåsnes, 2022, s. 19).

Í *Ein himmal fullur av skýggjum* eru óteljandi dømi, har Henrik kritiserar tey ráðandi. Hann heldur, at tey vaksnu fortreingja veruleikan. Hetta sæst t.d., tá hann sigur: "Tað løgna er, at tú kanst fortelja fólki nógvar sannroyndir, gera fleiri powerpoints og vísa dokumentarfilmar í sjónvarpinum, og kortini siga fólk bara: "*Uff, hatta var keðiligt, vónandi ger onkur okkurt við tað*""(Svingen 2018/2023, s. 71).

## *Humor ella álvarsemi*

*Ein himmal fullur av skýggjum* hevur ein opnan, góðan enda, har Henrik verður tikin í álvara av teimum vaksnu – hóast hann er barn og hóast teksturin hevur óteljandi dømi um, at børn ikki vera tikin í álvara. Hann verður boðin til USA at tosa um veðurlagskreppuna í ST. Harafturat er heilivágur funnin, so hann kann liva. Eitt tilvitað val hjá rithøvundinum, ið kann hugsast at vera orsakað av tí, sum komið verður til seinni, at ov nógvur umhvørvisótti kann skapa handlingslamni.

Tað er serliga tann knappa og óvæntaða vendin í plottinum ferð eftir ferð, ið ger bókina so stuttliga og øra. Henrik ætlar fyrst at ræna forsætisráðfrúnna fyri at fáa broytt skipanina til tað betra sum skjótast. Ætlanin miseydnast, men Henrik gerst vinur við dóttur hennara. Hetta gevur honum møguleikan at náa langt út í miðlunum. Hann lærir seg miðlaatburð fyri at fáa sín boðskap víða út, og tað eydnast honum framúr væl.

Teksturin er fyltur av humori og er samstundis sera álvarsamur. Humor er nógv brúkt amboð at viðgera álvarsom evni við í barnabókum. Bókin vann norska Bokslukerprisen 2019/20, ein virðisløn, sum næmingar í miðdeild lata. Tað var millum annað humorin í bókini, ið tey nevndu sum tað besta umframt spenningin og týdningarmikla evnið.

Nevnast kann í hesum sambandi, at Arne Svingen eisini hevur skrivað um umhvørvið til yngri børn, og tað er eisini kryddað við humori. Í røðini *Elvin Griff agentur* ræna børnini - tey kalla seg umhvørvispakkið - marglætisbilin hjá skúlastjóranum, tí tey halda, at hann dálkar alt ov illa. Hetta er úr samrøðu millum tey vaksnu: "hasir lortungarnir bara grenja um bilar og um umhvørvið og vilja hava, at øll skulu halda uppat at liva og hava tað stuttligt" (Svingen, 2020/2023, s. 79). Svarið hjá "umhvørvispakkinum" er: "Hvussu stuttligt verður tað at liva, um vit onga planet hava at liva á?" (Svingen, 2020/2023, s. 79). Hetta er eisini eitt gott dømi um, hvussu stórur munur kann vera á ættarliðunum, og er eitt slag av uppgerð við eldra ættarliðið og mátan, tey hugsa og liva uppá.

Bæði *Sum rótskot* og *Ein himmal fullur av skýggjum* eru realistiskar og samtíðarligar, og tær eru skrivaðar nøkulunda samstundis. Tær vísa á, hvussu børn og ung hugsa um, uppliva og taka støðu til veðurlagsvitan og veðurlagspolitikk. Tað er eisini freistandi at siga, at tær báðar vísa á, hvussu langt tað er millum vitanina, tey vaksnu og valdhavararnir hava, og hvussu tey handla. Báðar eru góð dømi um bókmentir um vistmedborgaraskap.

Báðar skaldsøgurnar hava høvuðspersónar, sum eru deyðasjúkir. Tað ber til at siga, at parallellur er settur millum sjúk menniskju og sjúka klótu – sjúka og veðurlagsbroytingar verða javnsett. Men sjúkan forðar teimum ikki í at handla, heldur tvørturímóti. Henrik endar við at fáa heilivág, sum ger, at hann sleppur at liva. Miriam doyr av sínari sjúku, men onkursvegna livir hennara orð víðari ígjøgnum loggbókina, ið verður lisin upp sum røða.

Størsti munurin á bókunum er kanska humor, og í hvønn mun hann verður brúktur í bókunum. Marianne Røskeland spyr í grein, har hon júst viðger bókina

*Ein himmal fullur av skýggjum*, í hvønn mun humor kann nýtast til at lýsa álvarsom evni og í hesum føri serliga umhvørviskreppuna og undirstrikar, at sjáldan førir vónloysi til aktiva handling, heldur tvørturímóti til óvirkni og undanførslu (Røskeland, 2021). Hon setir síðani tveir spurningar: Í hvønn mun undirbyggir skemtið í skaldsøguni ta vistkritisku verkætlanina við at geva innlit og skapa kritiska hugsan? Og í hvønn mun kann skemtið gera evnið vandaleyst og distrahera og harvið gera tað álvarsama evnið og teir kritisku møguleikarnar veikari?" Hetta eru spurningar, sum ein rithøvundur, ið skrivar til ung, altíð má hava í huga, serliga um hann, sum Marjun Syderbø Kjelnæs er inni á, við síni bók vil skapa broyting. *Sum rótskot* og *Ein himmal fullur av skýggjum* arbeiða báðar við at javnviga millum álvara og humor í lýsingini av sera álvarsomum evnum. Hóast høvundarnir grundleggjandi kunnu sigast at hava valt hvør sína leið, har álvarsemi er meira ráðandi í tí føroysku bókini og humor í tí norsku, so er týðiligt, at báðir tilvitað hava lagt eina vón inn í tekstin, ið eggjar til aktiva handling heldur enn óvirkni og undanførslu.

### *Visiónir og virkisfýsni*

Eva Munk, sum varð nevnd í innganginum, skrivar eisini bøkur til størri børn og ung. Hon hevur skrivað eitt tríverk, sum eitur *Grøn klode* (2020 -2022). Tað snýr seg um @grønklode, sum er ein bólkur av ungum fólkum, ið royna at gera ymiskt munagott fyri umhvørvið. Tey eru ofta úti og savna rusk í fjøruni ymsastaðni, og tey skipa fyri mótmælistiltøkum og kunnandi átøkum. Høvuðspersónurin Tenna er 14 ár í fyrstu bókini *Stormflod*, og hon hugsar nógv og stúrir nógv fyri tí, hon sær í miðlunum, eitt nú skógareldum, og um hvør framtíðin hjá jørðini verður:

> Hver gang vi får besøg af en UU-vejleder eller andre, der fortæller os, at vi skal tænke på fremtiden, får jeg ondt i maven. Jeg svarer ofte, at jeg ikke ved, hvad jeg skal. Jeg tør aldrig sige, at jeg ikke tror, at vi har en fremtid. I hvert fald ikke hvis vi fortsætter på denne måde. (Munk 2020, s. 7)

Men tað hjálpir henni, og hon fær betri mót, tá hon er virkin: "Handling er det eneste, der kan gøre den helt store forskel. Og jeg gør, hvad jeg kan, uanset om jeg skal dedikere hele mit liv til sagen" (Munk, 2020, s. 11).

Hesi orðini leiða tankarnar til Gretu Thunberg, sum eisini verður nevnd í fleiri av viðgjørdu bókunum. Í *Sum rótskot* verður hon fleiri ferðir nevnd, og víst verður til hana sum "gentan á skíggjanum":

> Tí hvussu kundi mann nakrantíð broyta eina fastlæsta heimsmynd ella røkka inn til eina heila mannaætt, sum ikki vildi flyta seg úr stað. Men tað var júst tað, sum vit vildu vera við til. Vit vildu skumpa og slíta alt leyst saman við gentuni á skíggjanum. (Kjelnæs, 2020, s. 57)

Við fyrimynd í veðurlagsverkfallinum "Fríggjadagar fyri framtíðini" hjá Gretu Thunberg er tað eisini, at Mirjam skrivar í sínari loggbók:

> Vit vilja ikki svíkja okkum sjálv, og vit vilja ikki svíkja hesa gongustjørnuna, sum vit liva á, tí standa vit her í dag, og tí fara vit at standa her so nógvar dagar, sum tað tekur, til tit, sum gera reglurnar, fata, at tað er nú ella ongantíð! (Kjelnæs, 2020, s. 7)

Í *Ein himmal fullur av skýggjum* hoyra vit eisini orðini, sum Greta Thunberg er kend fyri at siga hvønn fríggjadag, tá hon skulkar fyri at standa framman fyri Ríkisdegnum fyri at minna politikarar á veðurlagskreppuna: "Tí í skúlanum tosa vit alt for nógv um alt møguligt annað, sum í veruleikanum ongan týdning hevur, um heimurin fer í hundarnar" (Svingen, 2018/2023, s. 70). Havast skal tó í huga, at hetta var skrivað, áðrenn rørslan "Fríggjadagar fyri framtíðini" byrjaði. Bókin kom út í august í 2018, ið er sami mánaður og sama ár, sum rørslan tók seg upp. Hetta vísir væl, at Thunberg gjørdist ímyndin av hugsanum, sum longu rørdu seg í einum ættarliði av børnum og ungum.

## ***Borgaraólýdni***

Nevnt hevur verið, at høvuðspersónarnir í *Sum rótskot* fara so langt í umhvørvisstríðnum, at teir vilja fremja borgaraólýdni. Í paratekstinum í bókini verður spurningurin reistur, hvussu langt vit kunnu loyva okkum at fara fyri at vinna og røkka rættvísi. Hesin spurningur lýsir væl moralska stríðið, sum mótsetningurin millum ættarliðini trýstir tey ungu út í. Tey tosa um, at tað ikki er nóg mikið at halda talur og skriva skelti um, at onkur atsókn má til, og Miriam tekur spurningin um borgaraólýdni upp (Kjelnæs, 2020, s. 83). Teirra atsókn, har tey binda eina ketu í ein lyktarpela hvørjumegin vegin og rundan um seg sjálvi, eydnast ikki sum ætlað, tí Miriam má lúta fyri sínari sjúku mitt undir atsóknini (Kjelnæs, 2020, s. 102). Ketan gleppur í seinastu løtu, áðrenn ein bilur kemur koyrandi við nógvari ferð og skøvar lakkið á bilinum (Kjelnæs, 2020, s. 112). Tey framdu tó sínar ætlanir í verki og fóru so langt, sum tey hildu vera ráðiligt fyri at bjarga klótuni, og tey høvdu frammanundan gjørt sær nógvar tankar um borgaraólýdni, og hvussu langt mann kann loyva sær at fara (Kjelnæs, 2020, s. 42).

Henrik fer eitt fet longri, tá hann roynir at ræna forsetisráðfrúnna í *Ein himmal fullur av skýggjum.* Haraftrat letur hann seg úr klæðunum í beinleiðis sjónvarpssending, og á kroppin hevur hann skrivað við tussj: "Túsund fuglar doyggja, ímeðan tú lesur hetta". Á bakinum stendur: "Menniskju kukka longu plast", og síðan kemur ein pílur oman móti rumpuni. Á lørunum stendur: "Kom við á ferðina", og "Bjarga heiminum" (Svingen, 2023, s. 116). Sjónvarpsvertirnir tveita hann út alt fyri eitt, men videobrotið fer viralt.

Í *LA SKOGEN LEVE!* er eisini stríð millum ættarlið. Bao skrivar sum næmingarráðsforkvinna til vinkonuna á veg á fund um umhvørvið: "Man kan ikke stole på voksne hvis man skal få ting gjort, as. Må gjøre alt sjæl" (Dåsnes,

2022, s. 20). Og tað er sjón fyri søgn, tá hon á fundi møtir skúlastjóra, umboði frá kommununi og foreldraumboði. Hon setir sínar ætlanir frá lestrarráðnum fram; at skúlin skal fáa umhvørvisstempul við at minka um koyring, streymsparing og minni matoyðsl. Tey vaksnu halda tað vera “veldig flott”, men mugu fyrst “utrede”, sum báðir teir vaksnu menninir úttala seg (Dåsnes, 2022, s. 23). Skúlastjórin nevnir, at hetta er dýrt og má koma á fíggjarætlanina fyri næsta ár. Men tá tey skulu umrøða næsta mál, at víðka parkeringsplássið og høgga helvtina av skóginum, tí ferðslan er ov ótrygg, er beinanvegin møguligt at fáa pening til vega. Bao svarar aftur: “Så en fin parkering for dem som forurenser, det haster? Barn dør av klimaendringer også!” (Dåsnes, 2022, s. 25). Tá Bao fortelur vinkonunum um fundin, svara tær, at tað ljóðar, sum tey vaksnu ikki duga so frægt sum náttúrufakini á grundskúlastigi. Tá er tað, at tær koma á samt um at gera eina veðurlagsfrágreiðing, soleiðis sum politikarar altíð gera, men tær gera hana á ein sera pedagogiskan hátt við vón um, at tey vaksnu so fara at skilja. Bao átekur sær at stríðast fyri umhvørvismálum, hóast mamman ikki heldur, at tað er hennara ábyrgd. Men dóttirin svarar aftur við at spyrja, hvør so skal taka sær av tí, tí tað sær ikki út til at nakað annar ger tað.

Í partinum, sum eitur “Sivil ulydighet” (Dåsnes, 2022, s. 95), fer Bao í spiderman-masku, klintrar upp á høga takið á skúlanum og heingir ein stóran bannara upp. Á honum stendur RED SKOGEN! NEI TIL PARKERING! Vinirnir stroyma átakið, og tey fáa sera nógv uppmerksemi og stuðul. Men ikki nokk til at tey vaksnu lurta og akta. At enda flyta tey ungu út í skógin og ætla sær at búgva har í tjøldum, til tey vaksnu lurta og lata vera við at høgga skógin. Mamma Bao er sakførari, og hon finnur ein feil í mannagongdini, sum ger, at myndugleikarnir mugu steðga avskógingini og asfalteringini - fyri fyrst í øllum førum.

Ein íslendsk ungdómsbók, sum fer eitt vet longri enn hesar nevndu, er *Fjallaverksmiðja Íslands* (2019) eftir Kristín Helgu Gunnarsdóttur. Bókin snýr seg um sjey nýklaktar studentar, sum flyta út á bygd og í eina tóma barakk nær við Jøkulsárlón. Tey stovna *Fjallaverksmiðju Íslands* – eitt dreymasamfelag við vakrari náttúru, burðardygd og nøgdsemi. Einfalt lív er teirra stremban. Tey hava sítt egna lítla samfelag í samfelagnum. Ein frístat. Tey binda síni egnu klæði, planta og fara eftir mati í ruskbingjum, byggja og bryggja øl, samrøða, elska og droyma – og ikki minst stroyma tey sítt lív og sín boðskap beinleiðis út til allan heimin – og hava alsamt fleiri fylgjarar.

Áðrenn sjálv søgan byrjar, stendur: ”Fjallaverksmiðja Íslands er ognað verkfalsbørnum veðurlagsins og stríðnum fyri morgindegnum”. Og síðan koma tvey sitat frá Gretu Thunberg um at handla, har hon sigur, at hon vil ikki, at menniskju skulu vera vónrík, men at tey skulu hava misálit. Jú, vit hava tørv á vónini, sigur hon. Sjálvandi. Men tað, sum vit hava meira brúk fyri enn vónini, eru atgerðir. So skjótt vit fremja atgerðir, birtist vónin allastaðni. Tá og bara tá verður vón (Gunnarsdóttir, 2019).

Eins og í paratekstinum hjá *Sum rótskot* veit lesarin, hvat slag av søgu talan er um í hesari bókini. Tey ungu royna at skapa ein utopiskan heim í sínum

frístaði, og í samrøðunum millum tey ungu sæst, hvussu tey uppliva heimin, og hvussu tey halda, tann fyrimyndarligi heimurin eigur at síggja út.

Emma eigur byrjanarorðini, sum verða stroymd út í heimin:

> Attention! Þetta er lifandi streymi! Sjáið og njótið! Náttúran og dýrðin. Þetta er allt að fara. Friðsælu jöklarisarnir hverfa og yfirborð sjávar hækkar. Það er ykkur að kenna. Og hlýnun sjávar er líka í ykkar boði. Þið þarna, gamlingjar og gráðuga fólk. Veislan er búin. Farið að taka til! [...] Það er eingin pláneta B. (Gunnarsdóttir, 2019, s. 7).[6]

Eisini her sæst týðiliga tvídrátturin millum tað unga ættarliðið, sum í hesum føri heilt hevur tikið seg úr samfelagnum og normunum, og tey eldru, sum fáa av grovfílini.

Bókin hevur flottar náttúrumyndir úr loftinum, serliga av jøklum, millum kapitlarnar. Dóttir Kristín Helgu, Erla Guðný Helgadóttir, sum er jøklafrøðingur, hevur tikið myndirnar. Bráðnandi jøklar eru partur av innihaldinum, og hugurin ferðast til Okjøkul í Íslandi, ið - sum Andri Snær Magnason eisini skrivaði um í "Bréf til framtíðarinnar" (2019) - var fyrstur at missa sín jøklastatus orsakað av veðurlagsbroytingum.

Greta Thunberg verður siterað í *Sum rótskot*: "Vit kunnu ikki bjarga heiminum við at spæla sambært reglunum" (Kjelnæs, 2020, s. 37). Pax siterar eisini í bókini tær tríggjar reglurnar, sum arbeiðast má eftir: fyri tað fyrsta at hava tær røttu grundirnar, fyri tað annað at gera tað í tí rætta andanum, og fyri tað triðja at lata tey røttu fólkini fremja tað. Hann sigur: "Mann kann enda við at verða dømdur og fara í fongsul, men tað er tann prísurin, sum allar stórar og kollveltandi rørslur mugu gjalda" (Kjelnæs, 2020, s. 42).

Høvuðspersónarnir í øllum teimum viðgjørdu ungdómsbókunum enda við at fremja borgaraólýdni, og tá vit sum lesarar hava fylgt teimum so leingi, føla vit teirra ómegd og skilja eitt sindur betur, hví alt fer so vítt. Tey eru nóg vaksin og búgvin til at skilja, at okkurt álvarsligt má gerast fyri at tálma umhvørvistrupulleikunum, men tey eru ov ung til at vera tikin heilt fyri fult. Borgaraólýdni er ein áhugaverdur kontrastur til moraliserandi barnabøkur um lýdni, sum hava verið vanligar heilt frá byrjan.

[6] Attention! Hetta er beinleiðis stroyming. Hyggið og njótið! Náttúran og vakurleikin. Hetta fer alt at hvørva. Friðsælu jøklarisarnir hvørva og vatnstøðan hækkar. Tað er tykkara skyld. Og at havið hitnar er eisini tykkara skyld. Tit har úti, gomlu og gírigu fólk. Veitslan er liðug. Farið og ruddið upp eftir tykkum [...] Her er eingin planet B. (Gunnarsdóttir, 2019, s. 7, egin týðing).

## *Nútíðarmenniskjað uttan fyri siðmenningina*

Andri Snær Magnason lýsir í yrkingini “Neyðætlan”, hvørjar trupulleikar tað kann geva, um menniskjuni av onkrari orsøk noyðast aftur at liva í náttúruni:

> Um heimurin av onkrari orsøk rapaði so ætlaði eg
> altíð at flýggja út til Fugloyar og liva av jørðini
> kring oyðigarðin eins og mínir forfedrar høvdu gjørt í túsund
> ár men tá kom mær í hug at í amboðskassanum var einki
> uttan 7 unbrakkolyklar sum fylgdu við IKEA-innbúnum og um eg
> yvirhøvur slapp norður so stóð eg við hesum
> unbrakkolyklunum ímillum
> skvamblandi kóp og pliandi mása og grógvandi gras
> og eg hevði ýlt eftir kópinum og másanum og grasinum og læst
> tenninar í rekaviðin og doyð spakuliga
> (Magnason, 2017, s. 36)

Yrkingin stendur í *Bónusyrkingum* (1996/2017), ið flytur alskyns umhvørvistrupulleikar inn í ein sjoppingtúr í Bónus. Yrkingarnar eru lætt atkomuligar og tala til ungdómin. Eg-persónurin í yrkingini ímyndar sær, hvat hann skuldi gjørt, um tað skuldi hent, at heimurin gekk undir. Hann sær fyri sær, at hann kundi flýggjað til eitt fjarlagt stað og livað av jørðini. Skemtiliga og við speiskum tóna kemur fram, at nútíðarmenniskjað hevði ikki klárað at breyðføtt seg í náttúruni uttan modernaðar hentleikar. Hvørja nyttu skal unbrakkolykilin frá IKEA, sum vit øll eiga heima, gera, um vit verða sett í eina støðu, har vit ikki fáa mat úr handlunum?

Í nýggju felags-norðurlendsku myndabókini eftir Malin Kivelä, Martin Glaz Serup og Lindu Bondestam *Om du möter en björn* (2021) verður við speisemi lýst, hvussu nútíðar býarmenniskjað klárar seg, tá tað ein dag skal royna seg úti í skóginum.

Eitt barn fer út í skógin væl útgjørt við skótaryggsekki. Út í náttúruna, sum verður lýst sum okkurt annað og atskilt frá menniskjum og sivilisatiónini. Barnið hevur millum annað bókina *100 ting at gera í skóginum* og ipad við. Mentan møtir náttúru. Á fyrstu opnu síggja vit í bakið á tí lítla, forvitna barninum, sum stendur við eini tómari kurv í hondini framman fyri einum stórum korti av skóginum og myndum av teimum djórunum, sum har eru at møta. Her umskarast skaldskapurin við faktabókina, tí hon gevur hugasambond til eina handbók, ið gevur okkum nógv góð ráð.

Á næstu opnu kemur fyrsti teksturin. Har stendur: “Vad ska du göra om du möter en björn?” (Kivelä et al., 2021, s. 4). Og tað er jú ein sera viðkomandi spurningur at seta sær á veg inn í skógin, tí bjørnin dugir tað mesta betur enn tú: ”Spring inte, för björnen springer fortare än du. / Simma inte, för björnen simmar snabbare än du. / Klättra inte upp i något, för björnen klättrar bättre än du” (Kivelä et al., 2021, s. 5-6). Hetta er eisini veruleikakendur tekstur, men

tekningarnar broyta ikonotekstin, tí tær eru fyltar við humori. Hetta sæst eitt nú á skálkabrosinum hjá bjørnini, sum veit, at hon dugir betur, og barnið rennur fram um bjørnina, hóast tað mótsetta stendur í tekstinum.

Men hvat dugir barnið so betur? At tekna, at brúka ipad og at tyggja tyggigummi. Men hvussu hent er tað nú, tá yvirlivast skal í náttúruni? Men hygg síðan at myndini í endanum, tá bjørnin blæsur perfektu bløðruna! Tá mann hevur verið ígjøgnum alla bókina, so kemur eitt slag av niðurstøðu á síðstu reglu: "MEN! Björnen är inte lika rädd för dig som du är för den – och nu ved du varför" (Kivelä, Serup, Bondestam, 2021, s. 30). Bjørnin er jú við yvirlutan í øllum, sum telur!

Og hvar eru tey vaksnu? Tey eru als ikki við í bókini. Barnið fer sjálvt í skógin. Men tey vaksnu verða nevnd á baksíðutekstinum – altso uttan fyri sjálva bókina. Sum brølandi orð, sum koma við "caps lock" úr munninum á sjálvari bjørnini við teimum hvøssu tonnunum:

> SKOGEN. VILDMARKEN. DE VILDA DJUREN. DE VUXNA SÄGER ATT NATUREN ÄR SÅ FIN.
> ATT DET ÄR SÅ HÄRLIGT ATT GÅ PÅ TUR I DEN FRISKA LUFTEN.
> DE VUXNA SÄGER ATT BJÖRNAR ÄR LIKA RÄDDA FÖR DIG SOM DU ÄR FÖR DEM. MEN ÄR DET SANT?
> (Kivelä, Serup, Bondestam, 2021, bakperman)

Tey vaksnu kunnu síggjast sum umboð fyri tað pastorala, ta romantiseraðu náttúrufatanina, har menniskjuni liva í sivilisatiónini – uttan fyri tað villa og uttan fyri náttúruna – men elska at fara út í náttúruna at njóta hana eina løtu og billa sær inn, at tey hava fult tamarhald á bjørnini. Skeivleikin í hesi fatan, sum endurspeglast í bókini, er, at tann vaksni letur barnið halda, at tað er eins sterkt og bjørnin, og at tað hevur tamarhald á náttúruni.

Bókin ger gjøldur burtur úr býarfólkunum, sum hava tikið sær av løttum ein frídag burtur frá býnum og gerandisdegnum og eru farin ein túr "út í náttúruna". Júst tá spenningurin er størstur, tá vandin er í hæddini, og barnið má spæla deytt, hómast parkeringsplássið uttan fyri skógin við øllum teimum parkeraðu bilunum aftur, og barnið er sloppið út í sivilatiónina aftur. Fjú!

Íslendska myndabókin *Eldgos* (2022) eftir Rán Flygenring er dømi um, hvussu humor og ørskapur verða nýtt til at varpa ljós á, hvussu fremmandagjørd menniskju eru yvir av náttúruni. Bókin snýr seg um eina mammu, ið ikki vil lata sonin fara í skúla, tí lús er í skúlanum. Sonurin, sum eitur Kaktus, má tí fara við mammu síni, sum er ferðaleiðari, í ein buss at vísa ferðafólki runt í Íslandi. Tey koyra gjøgnum ymiskt slag av náttúru og koma brádliga til eitt eldgos. Ferðafólkini gerast púra vill og missa vit og skil, ør eftir at sleppa fram at eldgosinum - so nær sum gjørligt, og alt skal sjálvandi skjalfestast, og vandamiklar myndir skulu takast (Flygenring, 2022, s. 31-32). Bókin setir fram ta villu og óstýriligu náttúruna, umboðað av eldgosinum, og so menniskjuni, sum skifta ímillum at ræðast og vera hugtikin av náttúruni, sum er vorðin teimum

fremmand. So hugvekjandi og samstundis so ræðandi. Myndirnar eru villar og spennandi, og tað er gjøgnumgangandi, at menniskjuni verða teknað í svørtum og hvítum, meðan náttúran er litrík. Blóðreyða lavan verður høvuðs"persónur" í frásøgnini. Eldgosið stendur einsamalt og goysir á níggjundu opnu, har einasti teksturin er "Eldgos!!!" (Flygenring, 2022, s. 17-18). Á tíggjundu opnu sæst alt, sum kann krúpa, fara stormandi móti eldgosinum við myndatólum og kikarum, onkur við fjallstavi, onkur í rullistóli, og ein revur er eisini við. Á ellivtu opnu sæst, hvør tað er, sum er við yvirlutan her, menniskja ella náttúra, tí nú goysir eldgosið vilt og reytt og ræðandi, meðan menniskjuni standa lítil, svørt/hvít og samankroyst í bakgrundini (Flygenring, 2022, s. 21-22). Á síðstu opnu stendur ein leiðbeining til, hvussu mann ber seg at, tá mann fer at hyggja at einum eldgosi (Flygenring, 2022, s. 67). Her verður soleiðis eins og í *Om du möter en björn* faktatekstur blandaður inn í søguna. Skemt og ørskapur fylla nógv bæði í myndum og teksti. Spenningurin er í hæddini, tá mamma og sonur royna at bjarga einum revi, sum er komin í óføri, tí hann er komin ov nær eldgosinum. Tey megna ikki uppgávuna, men tá vísir tað seg, at drongurin er fullur í lús, og tað endar við, at ein stórur herur av lúsum bjargar revinum úr eldgosinum. Bókin vísir, at náttúran hevur valdið, og at menniskjuni eru hjálparleys og mugu laga seg eftir, at náttúran svarar aftur.

Hetta er dømi um, at skemt verður nýtt til at vísa á menniskjans máttloysi yvir av náttúruni og náttúrunnar fulla valdi, heldur enn ræðusøgur, ið sambært Røskeland (2021) kunnu føra til gerðarloysi fram um tað, at menniskju taka støðu og handla.

Danska ungdómsbókin eftir Zakiya Ajmi, *Vulkan*, á føroyskum *Eldgos* (2020/2023), viðger óbeinleiðis sambandið millum menniskja og náttúru. Eldgosið verður nýtt til at lýsa sinnisstøðuna á unga høvuðspersóninum, samstundis sum tað er ramma í søguni, ið er flættað inn ímillum kapitlarnar. Tilsipingin til vistkritikk og til ta stórbæru og ráðandi náttúruna er óbeinleiðis til staðar í lýsingini av eldgosinum. Tað verður fyrst skilmarkað sum fyribrigdi (Ajmi, 2020/2023, s. 41) og síðani lýst í sínum ymisku eginleikum, áðrenn tað at enda fer at goysa (Ajmi, 2020/2023, s. 41,81,131). At enda verður eldgosið sett í samband við menniskjuni við einari undran um, hvussu tað ber til, at menniskju finna upp á at búseta seg so nær við eitt eldgos.

> Mann kann undra seg um, at fólk búseta seg í skugganum av einum gosfjalli, tá vandin er so stórur. Men gosøskan er ómetaliga fruktagóð ... Eitt gosfjall, sum seinast var í útbroti fyri einum mansaldri síðan, tykist óskaðiligt. Vit gloyma, at tað kann fara í útbrot, nær tað skal vera. (Ajmi, 2023, s. 171)

Vit gloyma so skjótt, at náttúrumegin er sterkari enn menniskjað, og at tá eitt gosfjall hevur gjørt av at goysa, er menniskjað prísgivið.

Áður nevndu *Bónusyrkingar* eftir Andra Snær Magnason leggja út við at lýsa nútíðarmenniskjað í yrkingini "Homo consumus". Har vit fyrr vóru úti í náttúruni og savnaðu mat, eru vit nú inni í handlunum og savna:

> eg
> nútíðarmenniskjað
> skíggjasjúklingurin
> merki hvussu frummenniskjað brýtur fram
> tá ið eg strúki avstað við vogninum
> og savni og savni og savni …
> (Magnason, 2017, s. 13)

Yrkjarin vísir við humori, hvussu langt menniskjað er komið burtur frá náttúruni. Náttúran er skift um við ein handil, har tørvur ikki er á teimum fruminstinktum, sum verða lýst í yrkingini. Sum heitið vísir, er hetta frummenniskjað, sum verður sett fram, lýst sum alt annað enn eitt menniskja, ið livir í samsvari við náttúruna. Her er tað menniskjað sum ovurbrúkarin, sum verður lýst.

Marjun Syderbø Kjelnæs tekur evnið eitt fet longri og ger myndina av menniskjanum meira groteska:

> Í dag fari eg at bjarga
> einum heilum ídnaði
> undan fordøming
> sæl eru tey mettu
> tí tey hava etið upp
> sælar eru tær tómu hillarnar í køliskápinum
> tí í morgin byrjar alt av nýggjum
> (Kjelnæs, 2022, s. 117)

Marjun Syderbø Kjelnæs setir stuttskygdar egosentreraðar loysnir til matoyðsl í frásjón og problematiserar tær. Hon nýtir bíbilskan retorikk við orðingini "sæl eru tey …", sum í fjallaprædikuni anaforiskt verður nýtt til at læra menniskjuni at liva rættvíst, í friði og nøgdsemi (Matteus 5:3-11). Tá hon sigur "sæl eru tey mettu", verður myndin grotesk, serliga tí at hon við tí perspektiverar til, at summastaðni á klótuni sita menniskju svong, meðan okkara loysnir eru at tøma hillarnar í køliskápinum, eta upp og gerast enn feitari. Niðurstøðan er, at loysnin riggar ikki, tí í morgin byrjar sama kapprenning um at eta alt upp fyri aftur at fyribyrgja matoyðsli. Hetta er ein góð lýsing av, hvat tann broytta náttúrufatanin kann gera við menniskjuni og náttúruna.

Tað er áhugavert til endan at seta hesar tekstirnar í samband við eitt motiv, sum gongur aftur í føroyskum skaldskapi á manna munni, har huldufólk hava borið t.d. manni, ið var latin eftir einsamallur í Lítlu Dímun (*Sagnir og ævintýr I*, 1984, s. 66-67), og børnum, sum vóru horvin ella vóru burtur heimanífrá leingi

(*Færøsk Anthologi I*, 1891, s. 327), mat. Á hvør sín hátt viðgera hesir tekstirnir nútíðarmenniskjað, sum er so fremmandagjørt yvir av náttúruni, at tað ikki hevði klárað seg leingi uttan fyri sivilisatiónina. Við nútíðareygum hevði tað í øllum førum ikki verið ein so fjarur tanki at leitað sær til yvirnatúrligar frágreiðingar uppá, hvussu vit í Føroyum skuldu klárað okkum soleiðis, sum vit liva í dag, um matvøruhillarnar t.d. brádliga vóru tómar.

## Náttúran frá útjaðara til miðdepil

Greinin hevur víst á, at náttúran frá byrjan hevur havt stóran leiklut í føroyskum barna- og ungdómsbókmentum. Í teimum elstu barnabókmentunum hava tað mest verið djór við menniskjalíkum eginleikum, sum hava verið høvuðspersónar í søgunum, men eisini plantur hava havt ein leiklut. Við dømum úr føroyskari barnabókmentasøgu hevur verið víst á, hvussu lýsingin av plantum í barnabókum við tíðini flytur seg frá at vera allegori, sett fram fyri at bera ein boðskap, til at vera pallur og skemtiligur frístaður hjá barninum, har lærdómur verður flættaður inn. Í samsvari við mentanarliga plantugransking og broyttar áskoðanir á leiklutin hjá plantum í heimsins vistskipanum, sum staðfestir eginvirðið á plantum, fáa tær í barnabókunum eisini virði og týdning í sjálvum sær, og hvør einstøk av teimum skal virðismetast og kennast við navni.

Víst hevur verið á, at tær nýggjastu norðurlendsku barnabókmentirnar endurspegla menniskjans tíðarskeið (antroposen), har menniskjað verður sæð sum ein planetbroytandi megi. Hetta sæst serliga væl í teimum viðgjørdu myndabókunum eftir 2020. Mentan og náttúra eru her tvinnaðar saman, og menniskjað er ikki longur lýst sum miðdepilin í náttúruni, men sum partur av henni. Í summum av bókunum verður menniskjað enntá flutt so langt út í útjaðaran, at tað í lýstum framtíðarmyndum verður skrivað heilt úr bókunum og doyr, meðan náttúran yvirlivir. Umhvørviskreppan verður sett á breddan, og veðurlagið er afturgangandi tema.

Víst hevur verið á, at fyrsta føroyska skaldsøga, sum beinleiðis setir umhvørviskreppuna á breddan, er ungdómsbókin *Sum rótskot* eftir Marjuna Syderbø Kjelnæs. Henda bók tematiserar ikki einans menniskja mótvegis náttúru og veðurlagi, men speglar eisini tey mongu lýstu dømini av norðurlendskum ungdómsbókum, sum seta framskygd og virkisfús ung menniskju á pall, ið vilja fara langt í stríðnum fyri at bjarga klótuni frá undirgangi.

Við dømum um kritiskar og sarkastiskar tekstir í ymiskum sjangrum hevur verið víst á ræðudømi, sum eru sett fram í norðurlendskum barna- og ungdómsbókmentum, um hjálparloysið hjá nútíðarmenniskjanum, um tað brádliga verður sett í eina støðu - sum av fleiri orsøkum í dagsins samfelagi ikki er óhugsandi - har tað noyðist at venda aftur til at liva beinleiðis av náttúruni.

Í kannaða tilfarinum sæst, at veðurlagsstríðið er, sum Eva Munk vísir á, vorðið ein partur av samleikanum hjá ungum menniskjum, og at bøkurnar eru liður í uppalingini at gera børn og ung til virknar, ábyrgdarfullar og empatiskar

vistmedborgarar. Afturvendandi hugmyndaliga rákið í barna- og ungdómsbókmentasøguni, ið hevur havt uppalandi endamál á ymiskum stigum, sæst tó ikki aftur í hesum bókum, sum tað gjørdi, tá tær fyrstu barnabókmentirnar vórðu skrivaðar, í upplæring í lýdni yvir fyri teimum vaksnu. Tvørturímóti ganga hetjurnar í teimum nýggju barna- og ungdómsbók-mentunum ímóti ynskjum og væntanum hjá eldra ættarliðnum. Í umhvørvis-stríðnum yvirhálar yngra ættarliðið tey vaksnu, enntá í slíkan mun, at tey kenna seg noydd til at vera bæði foreldrum og landanna lógum ólýðin fyri at kunna fremja sína søk at broyta kósina í heiminum.

Allar hesar viðgjørdu bøkurnar hava víst á, at tað, sum fyrr var útjaðari, nú er miðdepil. At náttúran svarar aftur, sigur frá og krevur, at eisini hon skal sleppa at liva.

## Bókmentir

Adbåge, E. (2020). *Naturen.* (E. Adbåge, myndprýddi). Rabeén & Sjögren.

Ajmi, Z. (2023). *Eldgos*. Bókadeild Føroya Lærarafelags. (M. Jacobsen týddi). (Upprunaútgáva 2020).

Aldudóttir, S. (2022) *Ódjór.* (B.D. Christiansen, myndprýddi). Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Bondestam, L. (2022). *Mítt botnlív*. (L. Bondestam, myndprýddi). Bókadeild Føroya Lærarafelags. (S. Dahl týddi). (Upprunaútgáva 2020)

Christensen, Nina og Appel, C. (2021). *Children's Literature in the Nordic World*. Aarhus University Press / The University og Wisconsin Press

Crutzen, P.J. og Stoermer, E.F. (2000). "The 'Anthropocece'". *Global Change Newsletter,* 41, 17-18.

Djurhuus, H.A. (1922). 2. útgáva. *Barnarímur*. H. N. Jacobsens bókhandil.

Djurhuus, H.A. (1927). *Barnabókin*. 2. útgáva. Prentsmiðja H. N. Jacobsens bókhandil.

Dåsnes, N. (2022). *LA SKOGEN LEVE!* (N.Dåsnes, myndprýddi). Aschehoug.

"Esaias". *Bíblian*. Hin Føroyski Bíbliugrunnurin. http://www.biblian.fo/default.asp?gerd=visbok&bokid=23&kapitulid=53. Vitjað 01.11.23.

Flinker, J. K. (2021). "Antropocæne udfordringer og perspektiver i nordisk børne- og ungdomslitteratur". *På tværs af Norden: Økokritiske strømninger i nordisk børne- og ungdomslitteratur.* Ritstj. N. Goga og M. Eskebæk. Nordisk Ministerråd.

Flygenring, R. (2022). *Eldgos*. (R. Flygenring, myndprýddi). Angústúra.

*Færøsk anthologi*. (1891). V. U. Hammershaimb. S. L. Møllers Bogtrykkeri (Møller og Thomsen), København.

Garrard, G. (2004). *Ecocriticism*. Routledge.

Glotfelty, C. "What is Ecocriticism?" ASLE_Primer_DefiningEcocrit.pdf. Vitjað 15.10.23

Guanio-Uluru, L. (2021). "Plantekarakterer i et udvalg nordisk barnelitteratur". *På tværs af Norden: Økokritiske strømninger i nordisk børne- og ungdomslitteratur.* Ritstj. N. Goga og M. Eskebæk. Nordisk Ministerråd.

Guanio-Uluru, L. (2021) "Analysing Plant Representation in Children's Literature: The Phyto-Analysis Map". *Children's Literature in Education* 54:149-167. https://doi.org/10.1007/s10583-021-09469-2

Gunnarsdóttir, K. H. (2019). *Fjallaverksmiðja Íslands.* Mál og menning. Reykjavík. https://doi.org/10.1007/s10583-021-09469-2

Jónsson, S. G. (2019). „Bréf til framtíðarinnar." https://heimildin.is/grein/9463/andri-snaer-syrgir-okid-hvernig-skrifar-thu-likraedu-um-jokul/Vitjað 01.11.23.

Kivelevä, M., Serup, M.G. (2021). *Om du möter en björn.* (L. Bondestam, myndprýddi). Förlaget.

Kjelnæs, M.S. (2020). *Sum rótskot*. Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Kjelnæs, M.S. (2022). *Karmageitin.* Ungu Føroyar.

Kristiansen, A. (1977). *Kannubjølluvísur*. Egið forlag.

Magnason, A.S. (2001) *Søgan um bláa knøttin.* (Á. Jónsdóttir, myndprýddi). Bókadeild Føroya Lærarafelags. (L. Niclasen týddi). (Upprunaútgáva 1999).

Magnason, A.S. (2017). *Bónusyrkingar – 44% meira.* Ungu Føroyar. (S. Dahl týddi). (Upprunaútgáva 1996).

Marnersdóttir, M. (2018). "Náttúra í føroyskum yrkingum". H. Þráinsson og H.A. Sølvará (ritstj.). *Frændafundur 9* (s. 11-22). Hugvísindastofnum Reykjavík 2018.

Massey, G. og Bredford, C. (2011). "Children as Ecocritizens: Ecocriticism and Environmental Texts". I K. Mallan  C. Bradford (ritstj.). *Contemporary Childrens Literature and Film. Engaging with Theory* (s. 109-126). Basingstone: Palgrave Macmillan.

"Matteus". *Bíblian*. Hin Føroyski Bíbliugrunnurin. http://www.biblian.fo/default.asp?gerd=visbok&bokid=40&kapitulid=5. Vitjað 01.11.23.

Michelsen, S. (2003). *Loppugras*. Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Munk, E. (2020). *Stormflod. Grøn klode 1.* Forlaget klippe.

Munk, E. (2022). "Klimalitteratur – en genre i vores bevidsthed". *Standart* 2, juni 2022.

Oskarsson, B. (2012). *Stríðið um tað góða grasið*. (B. Oskarsson, myndprýddi). Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Røskeland, M. (2021). "Humor og engasjement i miljøorientert barnelitteratur". *Barnelitterært forskningstidsskrift. Nordic Journal of ChildLit Aesthetics.* Volume 12. No. 1 (p. 1-10). Universitetsforlaget.

Said, S. (2020). *Eta gras.* (S. Nordqvist, myndprýddi). Bókadeild Føroya Lærarafelags. (S. Dahl týddi). (Upprunaútgáva 2019)

*Sagnir og ævintýr I*. (1984). Jakob Jakobsen. H. N. Jacobsens Bókhandil, Tórshavn.

Sigurðardóttir, T. (2015). *Føroyskar barnabókmentir. Søguligt umhvarv og greiningar*. Setursrit 7. Sprotin.

Skyggebjerg, A. K. (2023). ""Jävla natur!"". *Dansk. Medlemsblad for Dansklærerforeningens Folkeskolesektion*. Oktober #3.

Svingen, A. (2023) *Ein himmal fullur av skýggjum.* Bókadeild Føroya Lærarafelags. (V. Streymoy týddi). (Upprunaútgáva 2018).

Svingen, A.. (2023). *Elvin Griff agentur 4. Flýggjanin til bakgøturnar.* (E. Gulliksen myndprýddi). Bókadeild Føroya Lærarafelags. (H. Niclasen týddi). (Upprunaútgáva 2020)

*Vøluspá*. (2017). Mentunargrunnur Studentafelagsins. H.M. Klein týddi.

Wistisen, L. (2021). "Barnboken i skräpocen: En undersökning av relationen mellan natur, kultur och skräp i Linda Bondestamd Mitt bottenliv" (2020). *På tværs af Norden: Økokritiske strømninger i nordisk børne- og ungdomslitteratur.* Ritstj. N. Goga og M. Eskebæk. Nordisk Ministerråd.

Österlund, M. (2021). "En tid bortom människans. Djuptid och ekokritiska perspektiv i Linda Bondestams bilderbok Mitt bottenliv" *På tværs af Norden: Økokritiske strømninger i nordisk børne- og ungdomslitteratur.* Ritstj. N. Goga og M. Eskebæk. Nordisk Ministerråd.